

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 11 - 2012

# Føroyar eiga at fyrireika seg til arktisku framtíðina

Um føroyskt vinnulív ikki longu hevur sett Arktis á dagskránna, so eigur tað at gera tað nú, sigur arktiski sendiharrin fyri Kongaríkið Danmark og harvið eisini føroyski sendiharrin fyri Arktis, Klavs H. Holm, sum júst hevur vitjað í Føroyum. Settur í januar Tað var í januar mánað í ár, at danski uttanríkisráðharrin, Willy Søvndal útnevndi fyrsta danska sendiharran fyri Arktis nakrantíð ella rættari fyrsta arktiska sendiharran fyri Kongaríkið Danmark Danmark, Grønland og Føroyar. Í vikuni vitjaði Klavs A. Holm í Føroyum, har høvi var at vitja í Tinganesi umframt at halda almennan fyrilestur á Østrøm, sum Fróðskaparsetrið skipaði fyri. Eisini stakk sendiharrin inn á gólvið hjá Statoil og fekk eina skjóta frágreiðing um leitingina hjá Statoil í Føroyum og í Arktis. Oljan.fo hitti Klavs Holm eftir fundirnar. Hann sigur seg vera fegnan um at hava fingið hesa týðandi uppgávuna, ikki minst nú hann er sendiharri fyri allar partar av ríkinum. Umboðar Kongaríkið Eg veit væl, at donsku sendiharrarnir kring heimin eisini umboða føroysk og grønlendsk áhugamál, men tað serstaka við hesum starvinum er heitið, ið er tað fyrsta av sínum slag Kongerigets Arktiske Ambassadør. Tað er jú eitt øki, sum serstakliga hevur áhuga í Grønlandi og Føroyum, og tí leggi eg eisini serstakan dent á at vera sendimaður fyri øll trý londini. -Skulu føroyingar tá kenna seg tryggar við, at tú fer at umsita føroysk áhugamál í Arktis? "Føroyingar skulu kenna seg tryggar við, at her finst ein arktiskur sendiharri, og sjálvandi fari eg eisini at taka mær væl av bæði føroyskum og grønlendskum áhugamálum." -Heldur tú Føroyar kunnu fáa lut í møguligum virkesemi í Arktis við at vísa økinum størri áhuga longu nú? "Tað haldi eg so avgjørt, tí vit fara at síggja eina heilt nýggja dagskrá fyri hetta stóra økið. Tann góða nýggjheitin er, at nú tað fer at taka drúgva tíð at menna møguleikarnar, so hava Grønland, Føroyar og Danmark eisini betri møguleika at fyrireika seg og harvið verður ein virkin

partur av framtíðar virkseminum. Avgerðir skulu takast og hyggjast skal frameftir. Dirvi skal til og síðani eisini pengar fyri at troyta møguleikarnar. Vinnulívið fyrireika seg Klavs Holm heldur, at føroyskt vinnulív longu nú eigur at hugsa um at brynja seg út til nýggju møguleikarnar í Arktis. Olja er so eitt, men møguleikar vera eisini hjá føroyskum fyritøkum at taka lut í økta og nýggja virkseminum í Grønlandi. Her liggja Føroyar væl fyri. Tað er bara at vera klárur, tá eftirspurningurin eftir vørum og tænastum fer at vaksa. Og so liggja Føroyar eisini á farleiðunum til og frá Arktis, sum eisini skapar møguleikar. Hann leggur tó aftrat, at føroyingar eiga eisini at taka avbjóðingarnar í kjalarvørrinum á veðurlagsbroytingum í størsta álvara, ikki minst nú samfelagið er so nógv tengt at, hvussu fiskastovnarnir ferðast. Føroysk strategi Arktiski sendiharrin hevur eisini nøkur góð ráð til føroyskar politikarar, sum hann heldur eiga at leggja orku í at orða eina føroyska strategi í Arktis og eisini vera tilreiðar at seta pengar av til tann útvikling, sum man ynskir at vera partur av. -Um økt virksemi í Arktis og Norðuratlantshavi fer at skapa so nógv ríkidømi, at Føroyar og Grønland kunnu gerast sjálvstøðugar tjóðir, kann tað so ikki merkja, at leikluturin hjá Danmark í Arktis verður nógv minni ella heilt eingin? "Tað vil tíðin vísa. Øll henda gongdin letur upp fyri nýggjum aspektum. Vit hava eisini sæð eitt kjak um júst hetta í seinastuni, og tað haldi eg er gott. Vit eru eisini í einum dialogi við bæði Føroyar og Grønland um hesar spurningar." (Meira um vitjanina hjá arktiska sendiharranum í komandi greinum á oljan.fo) Myndir Klavs Holm, arktiskur sendiharri hittir løgmann Kaj Leo Johannessen Herálvur Joensen, leiðari á uttanríkisdeildini á løgmansskrivstovuni og Klavs Holm Klavs Holm og Hanna í Horni, føroyskt umboð í Arktiska ráðnum Frá kunnandi fundi í Tinganesi, har Klavs Holm greiðir umboðum fyri føroyska arktiska kjarnubólkin frá sínum arbeiði og Arktis Myndir - Oljan.fo/Jan Müller